

Heri Petersen, Hoyvík

# Inntøkan hjá fólkapensjónistum hækkað nógv meira enn hjá arbeiðsfólki

## – stutt viðmerking til Arna Thorsteinsson

Arne Thorsteinsson (AT), næstformaður í Landsfelag Pensjónista, vísir í lesarabrævi á, at fólkapensjónin er minkað í virði í mun til lønarvøksturin í samfelagnum! Landsfelag Pensjónista er í fleiri umførum komin við hesum pástandum, sum eisini hava verið endurtiknir av politikarum og fjølmiðlum.

Tað er so deiliga lagaligt at arbeiða við tølum, tí tað er so nógv ymiskt, sum kann fáast burturúr, og úrslitini kunnu tillagast alt eftir, hvat mann velur at taka við. Í staðin fyri at siga, at grundupphæddin í fólkapensjónini ikki er hækkað síðani síðstu øld, so kann mann velja at siga, at útgjaldið frá Samhaldsfasta er hækkað við 284,3 % síðan 2004. Bæði tvey eru sannleikar, sum einsamalt geva lítla meining.

Sambært AT eigur javningin av pensjónum at fylgja lønarvøkstrinum á arbeiðsmarknaðinum. At javna eina lønarkrónu og eina pensjónskrónu við sama prosentsatsi gevur tvey ógvuliga ymisk úrslit fyri borgaran. Tað er jú munur á at javna eina skattskylduga krónu og eina ikki-skattskylduga krónu.

AT kemur í sínum lesarabrævi við eini rúgvu av tølum, sum eg havi meira enn trupult við at finna runt í. Eg havi í staðin valt at gera mína egnu samanbering av inntøkuvøkstri hjá ávikavist einum støkum fólkapensjónisti og einum lønmóttakara í Føroya Arbeiðarafelag (uttan børn og við miðal kommunuskattaprosenti).

**Hækking 2004-2011 í tøkari inntøku (t.v.s. eftir skatt og arbeiðsmarknaðargjøld):**

- Fólkapensjónistur uttan aðra inntøku enn fólkapensjón: Tøk inntøka hækkað við umleið 30 %
- Løntakari fulla tíð í Føroya Arbeiðarafelag: Tøk inntøka hækkað við umleið 14 %

Tað er ikki bara prosentfifl, at pensjónin er hækkað meir - eisini í krónum er pensjónin hækkað munandi meira enn arbeiðsmannalønin.

Tað, sum hevur týdning, er, hvat borgarin hevur at liva fyri, og hvat stendur eftir niðast á linjuni – og ikki hvussu partar av eini ógvuliga fløkjasligari pensjónsskipan eru javnaðir og ikki javnaðir.

Ein týdningarmikil partur av greinini hjá AT snýr seg um pensjónsnýskipanina, sum eg her ikki fari at fyrihalda meg til, orsaka av mínum avmarkaða kunnleika til nýskipanina.



Dagfinnur Danbjørg

# Brotsverk móti børnum við breki

SVF vísti í gjárkvøldið støðuna hjá einstøkum av teim mongu børnunum í okkara samfelag, ið hava sálarliga hjálp fyri neyðini.

Tað er fullkomuliga óskiljandi, at politiski myndugleikin góðtekur eina tvey ára bíðitíð, áðrenn kanning og viðgerð kann verða framd fyri hin einstaka.

Hetta er ein ómenniskjansligur atburður, sum ikki eigur at vera toldur.

Peningaliga sæð hava vit bæði ráð til at fáa kø-ina burtur innan fyri avmarkaða tíð og fáa avsett orku til framyvir at fylgja tørvinum soleiðis, at bíðitíðin ikki fer upp um ein mánað.

Menniskjansliga sæð eru vit sera fátøk, tá vit - í okkara peningaliga ríkidømi - loyva okkum at halda børnini (og teirra avvarandi) í svárari neyð yvir ár, tí vit ikki VILJA hjálpa teimum beinanvegin eftir at tørvurin hevur víst seg, tí - eisini og kanska serliga í tílíkum førum - er skjót hjálp besta hjálp, meðan seiðpínaríið bert økir um skaðarnar, ið kunnu standast - og sum standast - av óviðgjørdum sálarligum trupulleikum.

Fátækt er tað land, ið letur børn síni líða.






Annika Olsen
*Løgtingskvinna*

# Út við skotgravapolitikki og inn við samstarvi

**Soleiðis sum politiska støðan nú er vorðin, er tað neyðugt, at floksformenninir seta seg saman og finna parlamentariskar semjur um lógaruppskotini í Tinginum.**

Tað lættasta í verandi løtu er at sita í hvør sínari skotgrøv og skjóta eftir hvørjum øðrum við, hvør hevur skyldina av, at vit eru komin í politisku ógreiðu støðu. Summi peika eftir Fólkaflokkinum, onnur peika eftir teimum flokkum, sum sita eftir í landsstýrinum og aftur onnur eftir andstøðuni á Tingið (hvør hon so enn er í løtuni). Politikkur er sum eitt hjúnarband, tú kanst neyvan bara geva tí eina partinum skuldina fyri, at hjúnarbandið ikki virkar eftir vild. Ì politikki hava vit øll abyrgd, ábyrgd av at fáa tingini til at glíða, ábyrgd fyri tí áliti,, okkum er sýnt av veljarunum og vegna tey sett at stýra og løggeva í hesum landinum. Tað var ómetaliga harmiligt, at samgongan skuldi slitna, beint sum øll lógaruppskotini vóru borin í Tingið, men í politikki er man ikki altíð harri yvir, hvussu politisku viðurskiftini laga seg. Eitt mugu vit ásanna, og tað er, at verandi politiska støðan er heldur óvanlig, og tað er ikki ov lítið sagt, at vit hava eina politiska undantaksstøðu í Tinginum. Mál verða í heilum koyrd aftur í nevnd, mál koma ikki úr nevnd, mál verða samtykt, sum eftir fakligum metingum av røttum ikki áttu at verið samtykt o.s.fr. Støðan skyldast helst, at ongin veit hvør er í samgongu, og hvør er í andsstøðu. Sum støðan nú er vorðin kunnu vit velja millum tvinnir kostir. Annar er at liggja í hvør sínari skotgrøv og peika eftir hvørjum øðrum og hin er at vísa ábyrgd, dirvi og samstarvshegni. Eg vil avgjørt mæla til hetta síðsta. Tað liggja heili 100 lógaruppskot í Tinginum í løtuni, nógv góð lógaruppskot, sum eru neyðug at fáa samtykt, áðrenn Tingið fer í summarfrí. Uppskot sum betra um rættartrygdina hjá nógvum borgarum m.a. lógin um brúkaravernd og keyp og sølu av fastari ogn, byggilógin, lógin um ikki at diskriminera fólk við breki á arbeiðsmarknaðinum, lóg um náttúruvernd v.m. Vit eiga ikki at lata tilvildina ráða, har mál verða feld, tí onkur ikki skal fáa æruna av hesum lógaruppskoti. Við tí politiska ótryggleika, sum valdar í Tinginum í løtuni, hevði tað tí verið skilagott, at allir floksformenninir settu seg saman til tess at tryggja eitt so breitt parlamentariskt grundarlag sum møguligt fyri teimum uppskotum, ið liggja í Tinginum, og at fáa málini aftur úr nevnd og samtykt. Tey málini, har tað als ikki er parlamentariskt grundarlag aftanfyri, kann man lata liggja eftir í nevnd. Lata vit tilvildina ráða, eru vit við til at máa støðið undir politisku skipanini, og tað er tað neyvan nakar, sum vil. Tí verða vit noydd at finna tey bestu samstarvsevnini fram, vísa hegni og virðing fyri hvørjum øðrum, júst soleiðis sum tað fundamentið, okkara aldargamla Løgting byggir á.